# Og meðan Bjarni og Poul koyra á.......

NAPOLION MAGNUSSEN
Miðvágur



Søgur ganga um, at Poul Michelsen er í ferð við at snikka eitt komplott saman. Endamálið er at fáa uppreisn fyri sínum gamla hjartamáli; at fáa ein flogvøll á Glyvursnesi. Ein flogvøll, ið eftir øllum sólarmerkjum verður líka so óbrúkiligur sum hitt gamla hjartamál hansara, havnin inni á Sundi. Koyr á, Poul, tú fær helst eina standmynd av tær onkunstani í Havn fyri hetta um nøkur ár.

Men nú má onkur steðga Bjarna Djurholm við at fremja undirgravandi virksemi í Føroyun. So um Fólkaflokkurin ikki skiftir mannin út, má Løgmaður taka ábyrgd og geva honum fótin í reyvina. Hesin maðurin kann ikki blíva við at brúka skattapengar og Landsverk upp á tokutalu, veljaratekkjan og møsn, úr enda í annan. Hann sær út til at vera sjúkur í høvdinum, tí hann hvørki hoyrir ella sær nakað rundan um seg, uttan tað, ið hansara líkar og viðróparar siga. Alt annað verður skúgvað til viks.

Norska Asplan Viak gjørdi eina kanning, latin Landsverk á sumri 2006. Hetta var kanning av nýggjum flogvølli á 1600 metrar. 1600 metrar, har bygging á Skorhæddin er illa egnað, í Søltuvík er góð og á Glyvursnes er ivasom. Og tá eru mjørkatrupulleikarnir í Føroya størsta mjørkaholi ikki tiknir við. Og álíkavæl møsna Bjarni og co um altjóða flogvøll uppá 2700 metrar á Glyvursnesi. 1.6 milliard er ikki einki, og vit vita fyri víst, at tað talið er lágt sett. Landsverk kann biðja Asplan Viak ella Rambøll gera meting. Tá skula tit síggja, at her er talan um meira møsn!

Men lat okkum nú seta mjørkamátitól at kanna í 2-3 ár fyri at síggja, at hetta ið eg og nógv onnur siga hvørki er toku- ella mjørkatala.

Niðanfyri síggja tit uppsummeringina hjá Asplan Viak. Lesið sjálvi, so síggja tit, hvør støðan er. Og niðast eru link til alla kanningina og kvalitetssikringina frá Rambøll.

**OPPSUMMERING**
Vi har gjennom kartstudier funnet fire områder, i tillegg til den tidligere vurderte lokalitet helt øst på Glyvursnes/Dalurin, med tilstrekkelig utstrekning til at det skulle være mulig å etablere en flyplass med de nødvendige tekniske installasjoner:

**1** på Eysturoy på neset mellom Toftir og Æðuvik
**2** på Streymoy nordøst for Kirkjubøreyn syd for Torshavn
**3** på Streymoy rett øst for Kirkjubøreyn
**4** på Sandoy på neset mellom Sandur og Søltuvik
**5** på Streymoy fra Glyvursneset og sydover i Dalurin

Alternativ 1 anbefales ikke på grunn av topografien rundt innflygingtraséen fra nord over Skálafjørður. Riktignok vil hinderplanene i følge beregningene etter PANS-OPS kunne tilfredsstilles, men ikke hinderflatene etter Annex 14. Også prosedyrene for utflyging etter motorbortfall vil måtte få minimale slingringsmonn. Disse forhold kombinert med den store fare for turbulenser ved fremherskende vindforhold gjør at vi ikke anbefaler videre arbeid med alternativ 1,

Alternativ 2 anbefales ikke fordi det ikke kan etableres tilfredsstillende trasé for instrument-innflyging fra nordvest.

Alternativ 3 anbefales ikke, til tross for terrengmessig gode inn- og utflygingsforhold, fordi:
- terrenget gjør at det vil bli svært kostbart å etablere tilfredsstillende ekspedisjonsområde
- fordi området ligger svært høyt og derved utsatt for lave skyer og dårlig sikt og derved lav regularitet
- utflyging mot nord går rett over Torshavn og således vil kunne forårsake støy over bebygde områder

Alternativ 4 synes å være det beste alternativet til tross for en noe begrenset banelengde for landing. Det vil likevel kunne få avgangslengder på 1800 m og landingslengder på 1650 m, det vil si henholdsvis 550 m og 400 m lenger enn hva man i dag har på Vágar. Innflyging til begge baner vil kunne oppnå svært lave minima (beslutningshøyder), og det bør derfor kunne forventes en brukbar væravhengig regularitet. Det anbefales derfor at dette alternativet legges til grunn for et eventuelt videre arbeid.

Alternativ 5 synes å være et mulig alternativ. Det ligger nært Torshavn og får således en kort atkomstvei fra hovedtyngden av brukerne, men har noen klare ulemper:
- Innflygingsvinkel fra syd vil bli på 4,0º. Dette er fullt mulig, men ikke ønskelig.
- Terrenget i sydvest tilfredsstiller ikke Annex 14's anbefalinger om hinderfrihet, noe som kun kan avhjelpes ved betydelige masseflyttinger.
- Det vil også kreve svært store terrengarbeider både for selve rullebanen og sikkerhets-området og for å tilfredsstille krav om hinderfrihet utenfor sikkerhetsområdet, særlig i nordvest.
- Støyaspektet. Traséene for innflyging fra nord og utflyging mot nord går rett over Torshavn sentrum. Avstand fra baneende til byen er kun 3 km, og dette vil, særlig ved økende trafikk, kunne medføre støyproblemer.

Kanningin hjá Asplan Viak og kavlitetssikringin hjá Rambøll: kann øll síggjast á: www.logting.fo

# Heilaga alliansan

FINNUR HELMSDAL
tingmaður fyri Tjóðveldið



Kundi nevnt fleiri fyrrverandi politikarar og álitismenn annars, sum støðugt og áhaldandi hava ávarað ímóti "heilagau alliansuni" millum Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin. Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður lýsti eisini hetta álvarsmál í fram úr góðu røðu síni í samband við umrøðuna av uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2008. Heilaga alliansan millum hesar báðar flokkar stendur í løtuni í besta og fagrasta blóma. Uppskotið til fíggjarlóg er teirra og bert teirra. Alt, sum sambandsflokkurin, ígjøgnum Magna Laksáfoss, ætlaði sær av fingramerkjum, er ikki bert viskað út, tað er makulerað og koyrt niðan á Hjalla.

**Landskassin felagsnevnari**
Atdráttarmegin millum flokkarnar er ikki nýtt fyribrygdi. Hon hevur verið har leingi, og altíð verið sera sterk. Atdráttarmegin hevur verið so sterk, at ideologiskir mótsetningar og ójavnar hava verið skúgvaðir til viks. Hetta tí flokkarnir báðir hava júst sama innfalsvinkul til sítt politiska virksemi. Nevniliga, at landskassin skal nýtast til at tryggja flokkunum atkvøður. Og tað er júst tað, sum er bulurin og substansurin í heilagu alliansuni. Fólkflokkurin vil sleppa at nýta landskassan soleiðis, at ríku veljarar teirra sleppa undan at gjalda skatt og avgjæld. Um tað er soleiðis, at lækkandi inntøkur hjá landskassanum merkja, at Fólkafloksveljarar sleppa undan at gjalda, so er alt í lagi.

Javnaðarflokkurin góðtekur inntøkuskerjingarhugburð Fólkafloksins, um hann aftur fyri sleppur at nýta tær inntøkur, sum allíkavæl eru, til sínar veljarar. Klokkukláripolitikkur javnaðarmanna er, at teir taka landskassan á ryggin og so spræna tíggjutalsmilliónir í hvørt hol, teir síggja á vegnum. Hetta ger, at vegurin sær penari út eina løtu, og fólk eru tí so hjartans fegin um hesar oh so sosialu javnaðarmenninar. Hvør vinnur og hvør tapir í longdini, tað er ikki áhugavert. Um samfelagið verður skipað, um framtíðin verður tillagað og tryggjað, og hvør ríkisrættarliga støðan er tað hevur ikki áhuga í Fólka- og Javnaðarflokkinum. Tað, sum hevur áhuga, er at landskassin til eina og hvørja tíð verður nýttur til at útvega teimum atkvøður.

Fólkflokkurin og Javnaðarflokkurin eru har umframt eisini fult samdir um, at praktiskur politikkur altíð vinnur á løgfrøðini. Ja, tað er kanska teirra nýggjasta branding, at alt snýr seg um praktiskan politikk, og at løgfrøðin á ongan hátt má vera ein forðing fyri, at politikarin fremur tað, hann hevur hug til. Viðhvørt halda teir, at løgfrøðin skal tillagast praktiska politikkinum. Men ofta, so leggja teir líka í løgfrøðina. Tað eru altíð teir sjálvir, sum avgera hvat skal fáa avleiðingar, og einki fær avleiðingar.

Heilaga alliansan hevur so eisini fingið ta dimensiónina afturat seinastu árini, at báðir flokkarnir av hjarta hata Tjóðveldisflokkin, sum miðvísur, við hegni og arbeiðssemi vinnur alt størri part av veljarafjøldini.

**Mótsetningar ella...**
Nú verða Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin javnan umrøddir sum mótsetningar, bæði hvat idelogi og politiskum arbeiðshátti viðvíkur. Spurningurin í dag er kanska tann, um hesir báðir flokkarnir eru mótsetningar á tingi. Vit síggja í hvussu er, at Fólkaflokkurin við sínum høgraekstrimistisku sjefideologum bæði reiðrast og fríggjar inniliga við Føroya Javnaðarflokki, hvørs ideologar eina ferð taldust millum DKP'ararnar og vinstasosialistarnar.

Og soleiðis, sum ting- og landsstýrismenn hjá Javnaðarflokkin hugsa og gera í politiska rúminum, loyvir ein sær rættiliga at ivast í, um ein einasti dropi av sosialismu er eftir í æðrunum hjá einum einasta virknum javnaðarpolitikara. Teirra virðisgrundarlag og hugburður annars líkist alt meira ditto hjá Óla Breckmann, sum har aftur ímóti er snildur og letst, sum hann heilhjartaður er við í sosialu morgun- og kvøldmessunum hjá javnaðarmonnunum. Aftur fyri fær Óli ein samlaðan javnaðar ting- og landsstýrisbólk at leggja seg skerflatar og ofra framman fyri kapitalistiska altarinum.

Vit standa tí í teirra fyri okkara land so álvarsligu støðu, at talan er ikki bert um vanligu heilagu alliansuna millum Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin, vit uppliva eina ideologiska samanrenning, sum samstundis merkir fyrilitarleys høgrasnaring av føroyskum politikki. Alliansan hevur kanska sterkasta vápnið, ein kann hava í politikki. Teir hava óavmarkaða atgongd til landskassan, og teir gagnnýta hetta vápn til fulnar.

Lesarin spyr kanska, hvør leikluturin hjá Sambandsflokkinum er í øllum hesum ideologiska og politiska hurlivasanum. Hevur Sambandsflokkurin einki at siga. Og svarið er einfalt, at einasta orsøk til, at Sambandsflokkurin er í samgongu er, at hinir báðir flokkarnir hava ikki meirilutan einsamallir. Sambandflokkurin er við sum ífylla, og hann skal ikki trúgva, at hann skal hugsa um at hava annan leiklut. Vit sóu, hvussu teir í Fólka- og Javnaðarflokkinum bóru seg at, tá nýggi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum brádliga loyvdi sær at vekja allar fiskarnar. Hann var kjølhálaður, niðurtraðkaður og útspiltur. Men hvat gjørdi Sambandsflokkurin, lýðin og uttan at mukka át hann alt í seg aftur, og fór aftur í leiklutin sum ífylla. Og heilagaða alliansan sleppur at fram haldandi og ótarnað at liva sítt ábyrgdarleysa lív við landskassanum sum høvuðssponsori. Onkur annar hevur eisini spýtt í seinastu árini.

# Dúkkar kavarin ella kavar dúkkarin? Dúknagli ella kavnagli?

EYÐUN Á BORG
málverji



Í útvarpi var forvitnislig sending um at kava. Mitt í sendingini broyttist orðið knappliga til dúkka. Síðani varð tosað um eitt dúkk, ikki eitt kav ella eina kavan/kaving.
Fyrr varð sagt dúkkari og tann og tann hjá dúkkaranum. Verður hetta sagt enn? Eru vit ikki komin longri í 2007?
ALTSO: KAVA og KAVARI, ikki DÚKKA og DÚKKARI.
KAVNAGLI: Munnu timburmenn brúka føroyska orðið, kavnagli, ella siga teir dúkknagli um naglan, sum fær kavseymin undir kav?
BURMA, ikki BØRMA: Hví munnu útvarpsfólk siga Børma? Her er neyvan talan um danska ávirkan!?!
Á Borg á Argjum í skurðsól 2007

Við málkvøðu